# Martin Juul Jarnskor 65



1. september fylti ein væl kendur gøtumaður, Martin Juul Jarnskor, 65 ár.

Góði gubbi. At skriva tær eina føðingardagsheilsan fellur mær lætt, tí tú hevur verið okkara góði gubbi hjá okkum øllum, tað eg kann minnast. Ja, nú ert tú vorðin 65 ár, men tað sæst ikki á tær. Tú ert tann sami gubbi í góðum lag.

Nú búgvi eg saman við familjuni í Esbjerg, men góði gubbi, tá eg vitji heima í Gøtu, verði eg ongantíð gloymd av tær. Altíð ein pakka við onkrum góðum niður aftur við til okkara. Eg var eisini og vitjaði tykkum, nú eg var heima í summar í føðingardag hjá mammu, og var tað fyrstu ferð, eftir at tit hava fingið eini so deilig hús við deiligari íbúð í kjallaranum. So sigur tú við meg: Tú hevur ikki verið inni í kamarinum hjá mær og Henny. Nei, sigi eg. Tað havi eg ikki. Ja, men far so inn og hygg, sigur tú so. Tað fyrsta, sum eg síggi, er eitt býlæt av dóttur okkara Gerdu Astrid. Tað vart rørandi at síggja. So fari eg inn aftur í stovuna og spyrji teg. Góði gubbi. Hví hevur tú eitt bílæt av Gerdu Astrid standandi í kamarinum. Tað fekk eg ikki svar uppá, men eg fekk tað svar, at hon skuldi standa har, so leingi tú livir. Tað var rørandi at hoyra.

Góði gubbi og góða Henny. Mangar góðar løtur hava eg, Árni og børnini havt inni hjá tykkum, og mangan drekkamunn hava vit eisini fingið og brúna formakaku í sambandi við, at GÍ hevur spælt. Tit eru bæði framvegis aktiv í GÍ og hava havt ikki minni enn fimm spælarar á GÍ-liðnum, John, Dánjal, Pauli, Magni og Henning, og altíð hevur tú verið stoltur av teimum. Men teir eldast, so nú er bara Magni eftir, men summusonurin hjá mær, Súni, er jú komin heim úr Hollandi at spæla við GÍ. Abbasoninum ert tú ógvuliga stoltur av og fylgir væl við í hvørjum dysti.

Men góið gubbi. Eg hoyri, at tú hevur havt ein góðan føðingardag við nógvum gestum – ikki bara úr Føroyum, men so sanniliga eisini úr Íslandi, og eg ivist onga løtu í, at tit hava verið so blíð, at øll hava kent seg væl í tykkara heimi.

Góði gubbi. Eg kundi skrivað so nógv, men eg fari at enda við enn einaferð at takka tær og Henny fyri alt, sum tit hava verið fyri okkum og ynski tykkum báðum Guðs signing. Eg skal heilsa frá Árna og børnunum, mammu og systkinunum hjá mær við familju. Vit gleða okkum at síggja tykkum í november, tá tit koma í føðingardag hjá Henningi, nú hann fyllir runt. Og munnu vit ikki fara at fáa nakrar góðar og stuttligar dagar saman?!

Alt tað besta ynskja vit.

Guðdóttir tín Joan

## Til minnis um ommu mína, Agnes Mortensen

Ein kirkja við havið
stendur og lavir,
í myrkrinum skínir
hin lavandi stavur

Meðan vit tiga
og lýða á støpulin
- høgt hann man riða-
man ósædd hon gleðast
- handandi obolin

Táið í kassa
vit látast at føra hana,
beint við, óansað,
deyðin, tú rør hana

Hostandi hálshvítin
hevur upp hond,
setur sær sjón út um
suðuroyar-rond,
sær ei hvar báturin
leggur at strond

Alt sum við Tvøroyri
tíðinnar hav
tí verðsligu fjøruni
máar burt av

Agnar

Sosialurin i Sosialurin
Sosialurin Sosialurin

## Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á silvurbrúdleypsdegnum 3. august takka vit hjartaliga.

**Emi og Signar H. Poulsen**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæri maður mín, pápi, verpápi, abbi og sonur

**Jógvan Jacobsen**
Skáli

so brádliga doyði og varð jarðaður.

Takk til Jógvan Fríðriksson, prest, fyri góð og troystarrík orð og hansara serliga hjálpsemi.

Takk til sangarar, berarar, kirkjutænarar og øllum tykkum mongu sum hjálptu til á ein og hvønn hátt.

Takk fyri blómur, kransar og gávur til kirkjuna, og øllum tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Jonna, Ruth, Bernt, Jannet og Berlina**

# Til minnis um ommu okkara Idu Mørkøre
## 05.01.1909-13.07.2002

Ida omma var annarleiðis,
ongin ivi um tað
kvik og glað
løtt sum ein fjøður

eitthvørt, sum hevði við kettu at gera, vakti altíð ans
tað, sum ikki hevði navn,
varð kallað frensur, halin
»hale dyi nakke villina«
kettumál,
vit frá barnsbeini hava hoyrt

Kaffimaskinan, kall á frens, floytan, útvarp og
sjónvarp har frá
haaaaaallloooooooo
tað var ei óljóð, men
góð ljóð
inni hjá ommu Idu

við babba
oman til dunnurnar
síðani
bestu pannukakurnar, saltastu frikkadellurnar og søtastu bollarnir frá ommu

seymimaskinan
gullkjólin, klæðir til føstulávint, nýggjar køksgardinur
kreativ og kvik

oman í býin, út á kirkjugarð, norður til Vestmanna,
út á hav
heim til ketturnar

eitt satt útistrok
lívsorkuni bilaði onki
við/uttan sigarettum,
krabbameini, forstørrilsisglasi og hoyriapparati

hon »morðaði« sær
gomul ung omma
»fara tit ikki í býin at mora tykkum í kvøld?«
»sum tit altíð eru smartar«
»stuttligt at vera ungur í dag«
stuttligt at eiga ommu Idu

okkara omma
sum átti klæðir at læna okkum
toy at seyma út
røsk og glað
løtt sum ein fjøður

vit sakna teg
nógv
eru so góðar við teg

men enn
ert tú hjá okkum
vit bæði syngja, dansa,
seyma og eru útistrok við



og vit vita
tú hevur tað gott,
og uttan iva
morar tær við kettunum

hvíl í friði

Marianna
Christina Elisabeth
Julianna



# Vit trýsta harðari á speedaran

**Líka síðan ferðslulógin varð broytt fyri góðum tveimum árum síðan, er miðalferðin nógv økt. Mátingar vísa, at í Streymoynni koyra tveir av trimum bilum ov skjótt**

FERÐSLA
*Jón Brian Hvidtfeldt*




*Myndin vísir, hvussu stórur prosentpartur av øllum bilførarum koyra skjótari enn 80 km/t á landsvegi. Mátingarnar fyri 2000 eru gjørdar eftir 1.juli, tá ferðslulógin varð broytt.*
*Kelda: Landsverkfrøðingurin*

Nýggja ferðslulógin hevur nú virkað í yvir tvey ár. Við lógini vóru framdar fleiri broytingar, m.a. um revsng, tá fólk koyra ov skjótt. Eftir gomlu lógini misti ein koyrikorti treytaleyst í hálvt ár, um koyrt varð yvir 30 km/t meira enn mest loyvdu ferð. Men flestum kunnugt vóru hesar reglur broyttar, tá nýggja ferðslulógin kom í gildi 1.juli 2000. Nú siga reglurnar, at verður ein persónur tikin fyri at koyra skjótari enn 30 km/t meira enn mest loyvda ferð, missir viðkomandi koyrikortið treytað og kann sleppa upp til nýggja koyriroynd.

Hesar broytingar hava eftir øllum at døma fingið føroyingar at koyra skjótari. Landsverkfrøðingurin ger á hvørjum ári ferðamátingar kring alt landið, og tølini vísa tíðiliga, at meðalferðin er nógv økt, síðan nýggja lógin kom í gildi 1.juli 2000. Serliga síggjast stórar broytingar í Streymoynni og Eysturoynni.

### Tveir triðingar koyra ov skjótt

Árini frá 1994 til og við 1999 koyrdu umleið helvtin av bilførarunum í Streymoynni ov skjótt. Men í 2000 sæst ein týðilig broyting, tí tá vísa mátingarnar, at heili 65 prosent koyra ov skjótt í Kollfjarðartunnlinum, har mátingarnar verða gjørdar. Og í fjør øktist talið til 66 prosent, tvs. at tveir triðingar av øllum bilførarum koyra skjótari enn 80 km/t sum er mest loyvda ferð á landsvegnum. Eisini í mátingunum fyri Eysturoynna síggjast tíðuligar broytingar. Í 1994 koyrdu 20 prosent av bilførarunum skjótari enn 80 km/t, talið vaks spakuliga til 24 prosent í 1999, men í 2000 vísa mátingarnar, at heili 58 prosent av øllum bilførarum koyra skjótari enn 80 km/t. Í fjør minkaði talið á teimum, sum koyra ov skjótt, tó niður á 50 prosent.




*Myndin vísir miðalferðina á føroysku landsvegunum, tvs. har loyvt er at koyra 80 km/t. Frá 1994 til 1999 var at kalla eingin broyting í miðalferðini, og tí hava vit valt at seta tey bæði árini lið um lið á myndini. Tað er serliga í Streymoynni og í Eysturoynni at miðalferðin liggur væl omanfyri mest loyvdu ferð.*
*Kelda: Landsverkfrøðingurin*

Landsverkfrøðingurin ger eisini ferðamátingar í Suðuroynni, í Vágunum og í Borðoynni, men har eru tølini ikki so ógvuslig sum í miðstaðarøkinum. Í nevndu oyggjum koyra ávíkavist 19 prosent, 31 prosent og 18 prosent av bilførarum skjótari enn loyvt er á landsvegnum.

### Ferðslulógin orsøkin

Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd, metir broytingarnar í ferðslulógini at vera størsta orsøkin til, at fólk sum heild koyra skjótari í dag enn áðrenn 1.juli 2000, tá broytingarnar komu í gildi. Hann vísir á, at nógv hava ta fatan, at tað hendir einki, um tey koyra ov skjótt – tey missa bara koyrikortið treytað og fáa tískil ein kjans afturat. Men hetta er ein skeiv fatan, heldur Jón Kragesteen. Tí fólk skulu bæði upp til nýggja koyriroynd og missa harumframt koyrikortið treytað í trý ár.

Leiðarin á Ferðslutrygd sigur, at hann persónliga var ímóti broytingunum í ferðluslógini, sum geva treytaða frádøming av koyrikortinum, verður koyrt meira enn 30 km/t skjótari enn mest loyvdu ferð. Orsøkin var, at hann óttaðist gongdina, at fólk fóru at koyra skjótari eftir nýggju lógini. Og nú lógin hevur virkað í gott og væl tvey ár, vísa ferðamátingar, at miðalferðin á landsvegi fyri alt landið er økt úr 73 km/t í 1999 upp í 77,9 km/t í fjør. Og mátingarnar fyri Streymoynna vísa, at har verður í meðal koyrt 86 km/t.

– Tað er eingin ivi um, og tað vísa royndir úr øllum okkara grannalondum, at tá miðarferðin hækkar, økist vandin fyri ferðsluvanlukkum, umframt at vanlukkurnar gerast álvarsligari, vísir Jón Kragesteen á.

Hann kundi hugsað sær, at ferðslulógin á hesum øki varð endurskoðað, so at tá ein persónur t.d. koyrdi 130 km/t á landsvegi, misti koyrikortið treytaleyst. Tá átti at verið talan um »skerpaðar umstøður«, heldur Jón Kragesteen. Hann vísir á, at í dag ber til at koyra dupult so skjótt sum ein hevur loyvi til, tvs. 160 km/t á landsvegi, uttan at missa koyrikortið beinanvegin.

Hagtølini vísa, at samlaða talið av ferðsluóhappum ikki er økt síðstu tvey árini. Men harafturímóti vórðu fleiri skadd í ferðsluni í fjør, sammett við árið fyri.

### FAKTA

Landsverkfrøðingurin ger á hvørjum ári ferðmátingar á landsvegunum fleiri staðni kring landið. Kanningar verða gjørdar á hesum støðum: Suðuroy: á Nesi í Vági; í Vágum: við Leitisvatn; í Streymoynni: í Kollfjarðartunnlinum; í Eysturoynni: á Lambareiði; á Borðoynni: á tunnilsvegnum til Klaksvíkar.

Mátingarnar eru at finna í ársfrágreiðingunum hjá Landsverkfrøðinginum um ferðslu og á heimasíðuni hjá Landsverkfrøðinginum www.lv.fo

# 50 daga fongsul

**Ein 24 ára gamal maður varð seinnapartin mánadagin dømdur 50 daga treytaleysa fongsulsrevsing fyri at hava roynt at smuglað 458 gram av hasji til Føroya. Hasjið skuldi hann selja í Føroyum.**

LØGREGLA
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Maðurin, sum er búsitandi í Danmark, men av føroyskum uppruna, kom við Norrønu úr Hanstholm mánamorgunin. Maðurin skuldi eftir ætlan bara í grundlógaravhoyring seinnapartin mánadagin, men av tí at hann játtaði seg sekan í ákærunum, varð málið tikið upp til dóms beinanvegin.

Hasjið, sum varð keypt í Thy-leguni í Danmark, hevði hann fjalt í tveimum cola-dósum. Í grundlógaravhoyringini segði hann, at hann ikki hevði nakran keypara til hasjið í Føroyum. Hann segði seg ikki hava so nógvar pengar um hendi í løtuni, og tí metti hann tað vera ein lættur máti at forvinna eitt sindur av pengum.

Í rættinum kom eisini fram, at maðurin hevur ein líknandi dóm frá august 2000. Tá varð hann eisini tikin umborð á Norrønu, á veg úr Hanstholm til Føroya. Við sær ta ferðina hevði hann smáar nøgdir av hasji og amfetamin.

Ákærin kravdi í minsta lagi fongslulsrevsing í 60 dagar og helst 70-80 dagar, men tað metti dómarin vera í meira lagi. Dómurin var 50 daga fongsul. Harumframt skal hann gjalda sakarmálskostnaðin. Hóast tann 24 ára gamli játtaði seg sekan í ákærunum, tók hann ikki við dóminum, men bað um stundir at hugsa seg um. Hann hevur nú 14 dagar til tess.

Finn Ougaard, varafúti, var rímiliga væl nøgdur við dómin, hóast hann stutt frammanundan hevði kravt 60 daga fongsul. Hann væntaði tískil ikki, at ákæruvaldið fór at skjóta dómin inn fyri hægri rætt, velur 24 ára gamli maðurin at taka við dóminum.

Í bilinum hjá manninum funnu tollarar eisini tvær gamlar hernaðarriflur, onnur frá 1942 og hin frá tjúgunum. Ikki er loyvt at flyta inn vápn av slíkum slag til Føroya, og tí kravdi ákærin, at maðurin skal fáa 3000 krónur í bót fyri brotið á vápnalógina. Hesum var dómarin samdur í.

Tann 24 ára gamli maðurin varð latin leysur eftir at málið varð avgreitt.